## DAGSINS MEINING

# Eitt ønskriligt neyðarróp

Vanliga siga vit, at vit hava eitt vælferðarsamfelag. Tá vit ferðast úti í heimi hava vit lyndi at reypa okkum av okkara vælferðarskipan. Og tað er ikki sjáldan vit møta útlendingum, sjálvt írum og bretum, sum við undran tosa um norðurlendsku vælferðasamfeløgini. Men hvussu er nú støðan í okkara kæra vælferðarsamfelagið?

Um vit taka pulsin, so hoyrdu vit skelkandi tíðindini í útvarpinum hóskvøldið. Tá varð upplýst, at eini 450 sjúklingar fleiri kundu verið lagdir inn á Landssjúkrahúsið um árið, um ikki tað lógu so nógvir røktarsjúklingar á sjúkrahúsinum. Onkur av hesum røktarheimssjúklingum hevur enntá ligið á Landssjúkrahúsinum í tvey ár.

Fyrr í vikuni greiddi kvinna í sendingini, Føroyar í dag, frá, at tey noyddust heim fleiri ferðir um dagin fyri at røkta og vitja ein av teimum avvarðandi. Viðkomandi klárar ikki at hjálpa sær sjálvum, og tey hava í fleiri ár bíðað eftir, at viðkomandi kann sleppa á Láargarð. Ja, tey vónaðu, at tey, sum fara, búgva á Láargarði. So vónleys er støðan.

Harafturat er fleiri ferðir ta seinastu tíðina komið undan kavi, at heimarøktin er nógv skerd. Ja, hon er so skerd, at summi gomul hava bara ein tíma um dagin og summi kanska bara ein tíma um vikuna. Harafturat er so trongligt við játtanini, at heimahjálpirnar mugu gera tað, sum gerast skal í størsta skundi, fyri at kunna klárað setningin?

Er hetta støðan, vit kunnu bjóða okkara gomlu í tí harrans ári 2001? Teimu, sum bygdu hetta samfelagið - á skipsdekki, á virkjunum, í bøi ella í heimunum? Nei! Men samgongan reypar sær av, at ongatíð áður er so nógv brúkt til eldraøkið sum júst nú. Og líkt er ikki til, at hon er sinnað at bøta støðuna, um vit hyggja at uppskotinum til fíggjarlóg fyri næsta ár.

Tað er frálíkt at hava setningin, at Føroyar skulu gerast búskaparliga sjálvberandi, men tað kann ikki annað enn stríða ímóti okkara sosialu samvitsku, tá vit senda 350 milliónir av landinum, samstundis sum okkara gomlu og teirra avvarðandi rópa eitt so ønskriligt neyðaróp sum vit hoyrdu nú um dagarnar!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fullveldissamgongan hevur forsømt eldraøkið, heilsuverkið og skúlan

**Atli Hansen**



Síðani henda samgongan kom framat, hevur Sjálvstýrisflokkurin havt ábyrgdina av almanna- og heilsumálum - fyrst við Helenu Dam á Neystabø og síðani við Sámal P. í Grund. Og her er stak lítið komið burtur úr.

Einaferð í summar segði Helena í eini blaðgrein, at tað vóru gerningarnir, sum skuldu tala og tað kunnu tey flestu helst geva henni rætt í. Undir hesi samgonguni hevur verið ein larmandi tøgn í staðin fyri talandi gerningar. Helena Dam á Neystabø legði út sum landsstýrismaður við at gera eina broyting í pensiónunum, sum tey flestu eldri upplivdu sum eina eyðka skattabyrðu. Og restina av síni landsstýrismannatíð mátti hon so brúka til at rætta hesa fadesuna.

Og eftirkomarin hevur verið lítið mætari. Hann hevur seinastu tíðina tosað um eina eftirlønarskipan, sum valla nakrantíð sær dagsins ljós, tí at Fólkaflokkurin eigur hana og helst sjálvur vil sleppa at bera hana á tingborð, tí onkrum skal hann liva av í næsta valskeiði.

Og nú kemur so Helena Dam á Neystabø aftur - stutt eftir at uppskot til fíggjarlóg er latið inn - og sigur seg vilja hækka pensiónirnar. Hví nústani? Skal hetta takast í álvara? Hví ikki í fjør ella í fyrra ári? Ella bara áðrenn uppskot til fíggjarlóg varð framlagt? Hetta virkar ikki serliga seriøst.

Í Sosialinum 13.10.01 verjir HDáN seg við, at hon hevði skrivað eitt bræv til landsstýrið 16.09 um hesi viðurskifti. Hevur Sjálvstýrisflokkurin ikki verið við til at gera uppskot til fíggjarlóg ella givið sítt lyfti um at vera parlamentariskur stuðul til komandi fíggjarlóg? Um tingbólkurin hjá Sjálvstýrisflokkinum ikki stendur aftanfyri fíggjarlógina, so hava vit eina áhugaverda parlamentariska støðu.

Nú er tað at hækka eina pensión ikki nakar kunstur, um bert peningur er til staðar og taðrokni eg við, at andstøðin meira enn fegin vil hjálpa til við at vísa á.

Men tað sum er meira áhugavert at fáa at vita frá eini samgongu, er politkkur á ávísum økjum. Tað er jú tað, sum ein samgonga er sett til. Ikki bert til at fremja eitt ávíst fullveldisuppskot, men uppskot á øllum samfelagsøkjum. At reka samfelagið Føroyar. Og her má man spyrja, hvar íð visiónirnar blivu av. Skúlin, heilsuverkið og eldraøkið. Her er nærum einki gjørt, hóast samgongan kom til fíggjarliga skorin klæðir: Peningurin er settur á bók til at fíggja fullveldi og tað, sum er sett av til hesi øki í komandi fíggjarlóg, forslær sum ein skræddari á einum vælkendum heitum staði.

Tað er eisini torført bæðið at skerja inntøkurnar við 350 mió. kr. og rokna við størri sosialum ábótum.

Vit hava millum 200 og 300 eldri - og talið er vaksandi - sum við góðari grund kunnu stúra fyri framtíðini, tí einki er hugsað um, hvussu teirra røktar- og íbúðartrupulleikar skulu loysast. Bíðirøðin gerst bara alsamt longri av alsamt verri stilladum eldri.

Tað er gott at hækka pensiónir, men tað er ikki nokk. Fyri teimum flestu hongur hetta saman við, hvussu vit loysa viðurskiftini hjá teimum eldru annars. Hvussu skulu vit húsa teimum? Í hvørjum umhvørvi? Hvørjar tænastur skulu vera tøkar - eisini í nærumhvørvinum. Hvørja røkt skulu vit bjóða? Hvørja viðgerð og av hvørjum? Og hvar bleiv forrestin døgnrøktarskipanin innan heimarøktina av?

Spurningarnir eru nógvir, men samgongan hevur verið ógvuliga varin við at leka ein einasta tanka út um ætlanir á hesum økinum. Ella kanska eru eingir tankar.

**Eldrasambýli tykist í løtuni vera tað gandaorði, sum loysir allar trupulleikar innan**

eldrasektorin, men so einfald er tað helst ikki. Eingin tykist at hava ómakað sær til at definera eitt sambýli og tískil tykist longu nú, sum at tey eru um at vera ein trupulleiki í tí sosoiala strukturinum.

Ein onnur samgonga má til, um tey fyrr nevndu vanrøktu økini skulu hava nakran møguleika fyri at koma fyri seg aftur. Standurin sømir seg ikki einum vælferðarsamfelagið við hundratals millónum í yvirskoti á fíggjarkógini. Tað minnir um stuldur.

# "Vit eru glað" konsert í Runavík

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagin 28. Oktober verður barnakonsert í Ítróttarhøllini í Runavík. Á skránni verður mangt og hvat. Umframt nógvan sang, kemur eisini eina dramabólkur at framføra tvey drama, og vit fáa vitjan av tveimum nýggjum dukkum, sum koma at tosa við børnini og siga teimum eitt sindur um hvat tað er at verða vinir og hvussu ein kann blíva glaður.

Sanginir verður eisini nógv um hetta at verða glaður og um tann besta vinin vit eiga - JESUS. Ein stórur partur av fløguni Vit eru glað verður at hoyra, eisini hoyra vit eitt barnakór og ein nýggjan sangbólk við 4 toftagentum. Børnum dáma væl at syngja við, og tað fáa tey eisini møguleika til á hesi konsertini. Tvær ungar gentur koma at syngja kór saman við børnunum og 5 musikkarnir, úr Eysturoynni, koma at spæla undir.

Konsertin í Runavík verður tann síðsta, ið "Vit eru glað" ætlar at hava á hesum sinni. Í trý vikuskiftir út í eitt hava tey vitja Suðuroynna, Vágoynna og Sandoynna. Hetta hevur tikið nógva tíð, og ætlanin var ikki at hava fleiri konsertir enn hesar trýggjar - men tað góðtóku teir lokalu Eysturoyingar ikki - og hildu vit eisini tað kundi verða spennandi at enda við einari konsert á heimabana.

Konsertin í Runavík verður also sunnudagin 28. oktober kl. 15.30. Atgongumerki á kr. 30 eru at fáa við dyrnar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Ískoyti til framtak fyri einum fólkaheilsupolitikki

**Hans Pauli Strøm**
*løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin*



Onkur, sum hevur lisið grein mína fyrr í vikuni: "Neyðugt við framtaki fyri fólkaheilsupolitikki", helt at eg kundi verið meir ítøkiligur um, hvat vit skulu leggja í ein fólkaheilsupolitkk og hvussu man kann koma ígongd. So tí man vera neyðugt at skoyta nøkur orð uppí tað fyrru greinina.

**Endamálið við fólkaheilsupolitikkinum**

Vit eru neyvan ósamd um, at endamálið við einum fólkaheilsupolitikki er at skipa so fyri, at allir myndugleikar, stovnar, ráð og felagsskapir samvirka fyri at styrkja almennu heilsustøðuna hjá fólkinum, -við at eggja øllum til eina heilsugóða lívsførslu, - við at byggja upp heilsufremjandi atferð og umstøður, - og við at byrgja fyri sjúkuelvandi og heilsuskaðiligum viðurskiftum, - allastaðni í samfelagnum, á arbeiðsplássunum, í skúlunum, í heimalívi og frítíðarlívi.

**Fíggindar sum hótta fólkaheilsuna**

Vit hava óivað eisini øll eina hóming av, hvørjir fíggindarnir eru, sum hótta heilsu okkara, og sum eru atvoldin til, at alt ov nógv av okkum, ofta í okkara bestu árum, fáa óneyðugar heilsuskaðar at dragast við, fyri eina tíð ella fyri alt lívið.

Vit vita, at tað kann vera okkara liviháttur, stress, ov nógv tubbak og rúsdrekka, eta ov nógv ella ov feitan mat, røra okkum ov lítið. Tað kunnu verða arbeiðsumstøðurnar, sum kunnu geva arbeiðsskaðar ella líðandi niðurslíta førleika okkara. Tað tað kunnu vera vanlukkuligir skaðar vit fáa í ferðsluóhappum. Tað kunnu vera ítróttarskaðar.

**Blóðproppar og ryggsjúkur**

Og avleiðingarnar kenna vit eisini. Alt tað vit kunnu koma at dragast við, men sum kundi verið fyribyrgt, partvíst í hvussu er. Ryggsjúkurnar. Blóðpropparnir. Magasárini. Giktin. Ov høgt blóðtrýst. Allergi. Bronkitis. Ávísar sukursjúkur. Krabbamein. Hoyrn- og eygnaskaðar. Depressiónir. O.s.fr.

Men hvar vit skulu byrja? Hvat er tað týdningarmesta at seta á? Og hvussu skulu vit gera? Tað eru hesir spurningar, sum skulu loysast við einum fólkaheilsupolitikki.

Fólkaheilsupolitikkurin er tí ein ætlan í trimum stigum:

- Ein útgreining av hvussu heilsustøðan hjá føroyingum er í dag, hvat eru teir vanligastu og vandamiklastu trupulleikarnar fyri fólkaheilsuna, og hvørji viðurskifti eru tað serliga, sum elva til heilsuskaðar, og sum vit tí skulu verja okkum ímóti?
  Hetta er ein uppgáva fyri heilsuverkið, t.d. fyristílað av Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu, og í samstarvi við kommunulæknar, skúlalæknar, heilsusjúkrasystrar og heimarøkt.

- Út frá hesum útgreiningum verða sett tey mál, sum vit vilja leggja orku í fyri at røkka. Hesir yvirorðnaðu málsetningar eru ein uppgáva fyri politiska myndugleikan, Almanna- og heilsumálastýrið og Løgtingið.

- Út frá hesum heilsupolitisku málsetningunum verður so gjørd ein ítøkilig ætlan, hvørji tiltøk skulu setast í verk, fyri at náa málunum. Hetta skal verða ein samskipað ætlan, ein felags uppgáva fyri allar avvarðandi partar, allar heilsustovnar, ráð og skipanir, fyribyrgingarráð, stovnar og partar á arbeiðsmarknaðinum, allir teir sjálvbodnu felagsskapirnir á heilsuøkinum, og allir hinir felagsskapirnir, sum ítróttarfeløgini, bygdarfeløgini, ungmannafeløgini, frítíðarfløgini, pensjonistafeløgini...

Á henda hátt eigur eitt væleydnað framtak fyri fólkaheilsuna at verða ein felags uppgáva fyri okkum øll og til okkara felags gagn.

# Kvinnuskeið um sjálvsmenning

TÍÐINDASKRIV

Ert tú konufólk og hevur áhuga fyri at menna teg persónliga, hevur júst hetta skeið kanska tín áhuga. Skeiðið, sum er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum, verður hildið í Havn í døgunum 17. — 18. november í ár

- Ein ferð byrjar altíð við fyrsta fótafetinum, sigur skeiðleiðarin, sum seinastu fýra árini hevur hildið serstakt skeið fyri kvinnur. Ein orsøk til at hetta er kvinnuskeið burturav, kemst av, at kvinnur kenna seg tryggari og kunnu betur tosa um síni viðurskifti sínamillum, tá tær eru í bólki fyri seg.

Tað sigur Anette Sundby, skeiðleiðari. Hon er upprunaliga útbúgvin fólkaskúlalærari, men hevur seinastu 12 árini skipað fyri skeiðvirksemi, har hon m.a. lærir kvinnur, hvussu tær kunnu mennast og hervið styrkja persónliga sjálvsvirðið.

- Nógvar kvinnur koma á hesi skeið, tí at tær hava hug at læra okkurt nýtt, ella tí tær standa á einum vegamóti í lívinum, har tær hava tørv á at læra meira um sínar persónligu eginleikar, sigur Anette Sundby.

Orsøkin til at hon hevur ment hesi serligu kvinnuskeið, er, at hon hevur verið fyri stórum mótburði í lívi sínum. Tað hevur gjørt, at hon oftani hevur verið ivasom um sítt kvinnuvirði. Fyri at vinna á ivanum hevur hon stríðst fyri at endurskapa kensluna av síni styrki sum kvinna. Tað eru m.a. hesar royndir, sum Anette Sundby vil geva víðari til sínar medsystrar.

Skeiðið er fyri kvinnur í øllum aldursbólkum. Ert tú áhugað fyri at læra okkurt nýtt, sum kann menna teg í arbeiðs- og persónliga lívinum, er hetta skeiðið kanska ein møguleiki.

Skeiðið er ikki nakar ”undurkurur”, men meira ein byrjan til eina prosess, har tú fært hugskot og íblástur m.a. til at skapa broytingar í lívsgrundarlagnum, sum tú kanska droymir um, men ikki veit, hvussu skal fremjast.

Á skeiðnum er møguleiki at gera sær tankar um lívið, at hugsa seg gjølla um og at arbeiða fram ímóti at seta sær nýtt stevnumið.

Skeiðið verður í Stoffalág 82, 17. — 18 november, frá kl. 9 — 17 báðar dagar. Luttakaratalið er avmarkað til í mesta lagi 16 luttakarar. Kostnaðurin er 1850 krónur, íroknað skeiðtilfar og kostarhald.

Áhugaðar kunnu fáa nærri upplýsingar um kvinnuskeiðið við at venda sær til Sigrún Mohr, telf. 315298, ella til Anette Sundby, tlf.004545424650, telduadr: email@anettesundby.dk Eisini ber til at fara inn á heimasíðuna www anettesundby.dk


